FYLGISKJAL 3

LM-048/2020

**Til Almannaráðið**
**Eirargarður 2**
**100 Tórshavn**

**Viðv. aftursvari til hoyringsskriv frá Almannaráðnum 9. Juli 2020 Mál nr. 20/00545-3.**

Tað er eingin loyna, at í hesi koronatíð og summarfrítíð hevur tað ikki verið so lætt at møtast til fund um hesi viðurskifti.

Tað vit í nevndini hjá Fosturforeldrafelagnum mest hava hugsað um, er lummapeningurin til børnini, sum vit ikki halda er hækkaður nakað serligt gjøgnum árini.

Eisini er tað sindur spell, at lummapeningurin verður skattaður, antin hjá barninum ella hjá fosturforeldrunum, men skilja vit, at hetta er broytt, men skilja eisini á onkrum, at tað framvegis verður skattað.

Vit eru samd um við AMR at heita á politikkararnar um at broyta lógina, so at lummapeningurin verður skattafríur. Eisini halda vit, at lummapeningur ikki er hækkaður í fleiri ár.

Sum nú er, verður allur lummapeningurin javnaður, men aðrar samsýningar til fosturforeldur og veitingar annars verða ikki javnaðar, sambært kunngerðini. Hví er hetta so ?

Sjálvandi ynskja vit sum fosturforeldur, at kunngerðin til fosturforeldraskipanina verður dagførd og javnað eins og lummapeningurin.

Henda samsýning er ikki javnað síðani 2009.

Tórshavn, tann 21. august 2020

Vegna Fosturforeldrafelagið
Randfríð Sørensen, forkvinna